


*Við sigrinum í Havn, hava stjørnu-kvinnurnar nú fyrimunin*

*Myndir: Álvur Haraldsen*

# 1-0 til Stjørnuna

**HONDBÓLTUR** Stjørnan loysti uppgávuna í høllini á Hálsi í dag. Vinnur Neistin ikki í Klaksvík skírisdag, eru klaksvíkskvinnur føroyameistarar

Uni Holm Johannesen

Tað var ein vánaligur hondbóltsdystur. Rætt og slætt.

Tað hugsa klaksvíkskvinnur neyvan um í dag. Nú hava tær fyrimunin. Stjørnan kann vinna føroyameistaraheitið í vikuni á heimavøllinum í Klaksvík.

Tað bygdu skrokkin til frálíka útgangsstøðið í gjár. Tað var við bit og slit, at tær vunnu. Eitt mál skilti liðini. Úrslitið var 22-21. Dysturin var vánaligur. Liðini framdu óvanliga nógv mistøk. Tað var lítið bit í álopsspælinum. Tað var týðiligt, at týdningurin av dystinum, at meistaraheitið stendur upp á spæl, merkti spælararnar. Tað eyðkendi dystin, at flestu spælararnir spældu illa.

### Jacklin í hopla

Tað var serliga ein, sum skaraði burturúr í gjár. Jacklin Durhuus var stórspælandi. Hon skeyt átta mál, og stríddust væl í verjupartinum. Umframt hana, spældi Durita Christophersen, Stjørnan, væl. Tað var lítið um hinar. Barbara Brauer, sum hevur verið millum tær bestu í hesum kappingarárinum, var mansvard beinanvegin, og Neistin hevði einki annað at dúva uppá, uttan dirvið hjá Jacklin Durhuus.

Munurin var lítil og eingin. Liðini togaðust um leiðsluna allatíðina – og Stjørnan var akkurát omaná tá avtornaði.

### Alt at vinna

Neistin hevur alt at vinna hósdagin. Neistakvinnur skulu vinna fyri at halda lív í vónini at vinna føroyameistaraheitið. Uppgávan hjá venjaranum, Birgir Hansen, er nú at syrgja fyri, at spælararnir eru ikki eins fjálturstugnir sum hesaferð. Tað ræður um at hava neyðuga tolið. Kanska tær lærdu av dystinum hesaferð.

*uni@sosialurin.fo*

**Neistin – Stjørnan 21-22 (12-13)**

Dómarar: Heri Petersen og Dánjal Samuelsen

**Neistin:** Jacklin Durhuus 8, Barbara Brauer 5, Unnur Danielsen 2, Rakul Magnussen 2, Nicoleta Radu Hansen 2, Birita Wardum 1 og Lovisa Andreasen 1.
**Stjørnan:** Valentina Suciu 6, Alina Anghel 4, Durita Ljósstein 4, Durita Christophersen 4, Bára Klakkstein 2, Judit Hansen 1 og Durita Mikkelsen 1.

# Kollfirðingar ræddust uppgávuna

**HONDBÓLTUR** Kollfirðingar vóru púra av ongum fyri steðgin, og tá var finaluhýrurin horvin. Tað var klassamunur í høllini í Kollafirði, og tað er alt sum bendir á, at Neistin fær gullmerkini hósdagin

Uni Holm Johannesen

Tað var eingin slingur í valsinum. Neistin hevur verið oddalið alt kappingarárið og vann uppiborið í fyrsta finaludystinum. Ellivu mál skilti liðini.

Tað er alt, sum bendir á, at Neistin endurvinnur føroyameistaraheitið skírisdag. Liðið hevur verið nógv best í hesum kappingarárinum. Klassar betri enn mótstøðuliðini. Avrikið hesaferð var so sannførandi, at tað verður lítið og einki væntað av kollfirðingum í seinna finaludystinum.




*Neistin vann greitt og uppiborið í Kollafirði og tók eitt fet nærri føroyameistaraheitinum*

### Vánaligur hálvleikur

KÍF fekk fimm mál fyri steðgin. Tað er vánaligt, rætt og slætt. Kollfirðingar vóru púra av ongum. Orsøkin var fremst av øllum, at kollfirðingar ræddust uppgávuna. Spælið var óskipað. Verjuparturin var lítið nærlagdur, og óneyðug mistøk darvaðu álopsspælinum. Saknur var serliga í Arnbirni Hansen og Gert Hansen, sum nú tørna út fyri fótbóltsfelagið EB/Streymi. Samstundis spældi Neistin væl. Tað var ikki lætt at verja fyri David Edvardsen, sum var stórspælandi. Danin slapp fleiri ferðir í góða skotstøðu, og hann tók oftast av møguleikanum. Hann fekk 10 mál.

Heimaliðið fekk fótin fyri seg eftir hvíldina, men tá høvdu gestirnir væl og virðiliga tryggjað sær sigurin.

Ivamálini, um tað hevur darvað spælið hjá neistamonnunum, at teir hava einki havt at spælt fyri í fleiri vikur, vóru kveistraði burtur beinanvegin. Tað var eingin finaluhýrur í Kollafirði. Neistin bukaði kollfirðingarnar. Stigatalvan í Atlantic Airways-kappingini sigur greitt, hvussu einaráðandi teir bláu hava verið. Tá øll liðini høvdu spælt sínar 24 dystir, var Neistin heili 13 stig framman fyri KÍF. Tá skal viðmerkjast, at oddaliðið spældi ikki við fullari megi seinastu dystirnar, og tapti fyri bæði H71 og StÍF.

### Seinasti møguleikin

Skírisdag verður seinni finaludysturin. Framvegis er einki avgjørt, er svarið, um tú spyr neistafólk. Skinnið verður ikki selt, áðrenn bjørnin er skotin. Tað skal hinvegin verða sera undarligt, um Neistin ikki fær føroyameistarasteypið í hesari vikuni. Neistin hevur vunnið allar sínar seks dystir á kollfirðingar í hesum kappingarárinum. Fýra landskappingingardystir, steypafinaluna og fyrru finaluna um føroyameistaraheitið. Jan Ottesen, venjari hjá KÍF, hevur tríggjar dagar at fáa sínar spælarar at skifta ham. Hann veit, hvør mótstøða bíðar teimum. Tað tykist sum ein ómøgulig uppgáva at loysa.

**KÍF - Neistin** 24-35 (5-15)

Dómarar: Eyðun Samuelsen og Andreas F. Hansen

**KÍF:** Ási Dam 5, Rógvi Weihe 5, Agnar Joensen 3, Niklas Reginsson 3, Rúni Joensen 3, Andrias Nielsen 2, Teitur Joensen 1, Hans Eli Sigurdbjørnsson 1 og Tony Weihe 1.
**Neistin:** David Edvardsen 10, Jugoslav Djumic 5, Finnur Hansson 5, Áki Mørk 4, Heini Hanusarson 4, Teitur Magnusson 3, Ingi Olsen 2, Heini Ragnarsson 1 og Kristian Dulavík 1.